# Kunngerð um kirkjuráðsval

Hervið verður gjørt kunnugt, at kirkjuráðsval verður í Klaksvík **týsdagin 8. november 2005**. Valið fer fram í **Christianskirkjuni** nevnda dag frá kl. **10 - 12 og 16 - 20.**

Møguleiki er fyri at atkvøða við brævatkvøðu. Hetta gerst við at venda sær til **Fólkayvirlitið Klaksvíkar Kommuna** í seinasta lagi **fríggjadagin 4. november**.

**Valstýrið fyri Klaksvíkar kirkjusókn**
Ólavur í Mittúni, formaður

# Frá FNÚ

**Føroya Náttúruverndarfelag**

Fyrilestur um »**umhvørvi og oljuleiting**« verður á Bládýpinum í Havn hóskvøldið kl. 19.00.

Øll eru vælkomin.

Aftan á verður limafundur.

**Nevndin**

# ÁRSVEITSLAN

Hjá Tórshavnar- og Kollafjarðar Bátafelag verður tann 12. november 2005 kl. 19.00 í bygdarhúsinum í Kollafirði

Bussur koyrir ókeypis úr Vágsbotni kl. 18.30

Atgongumerki keypast í kunningarstovuni í Havn og í Kjalnesbúðini

TÓRSHAVNAR- OG KOLLAFJARÐAR BÁTAFELAG

## HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

Vikuskiftisvaktin hjá

SOSIALINUM & PORTALINUM

er at hitta alt vikuskiftið á

22 50 00

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum



VIVA

## Bilur til sølu



## Ford Transit 2.0 TD

Arg. 24.05 2002, koyrt 48.000 km.,
9 Persónar (lítla koyrikortið)

**Kostnaður kr. 239.000,00 írokn mvg.**

Bilurin er í sera góðum standi.

**FF Bilaleiga/Hertz**
Tlf 213546 ella 211025

***Sí fleiri bilar á www.ff.fo***

Hertz Hertz Hertz Hertz

# Frá Runavíkar Kommunuskúla

Søkt verður eftir vikari til at byrja sum skjótast fyri lærara í farloyvi til 1. des.

Í tímatalvuni eru 14 tímar: Føroyskt og enskt í 10. flokki og 6 tímar bókasavn.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at ringja 217331.

**Runavíkar Kommunuskúli**

# Hondlesing í Tórshavn í november

Hondlesarin Marita er í Føroyum. Lesir tína hond – fortíð, nútíð og framtíð – styrki og veikleika. Ein annarleiðis máti at síggja teg sjálvan.

Vinarliga ring og bið um tíð á
**tlf. 0045 39664880 ella 0045 3116 8053**

# Frá Maskinmeistarafelagnum

Noktað verður limum felagsins at taka upp arbeiði, sum er rakt av ósemjuni millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið.

MASKINMEISTARAFELAGIÐ

# Vikarur fyri savnsarkitekt

Av tí at deildarleiðarin á bygningadeildini fer í farloyvi, er eitt áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt starv á Føroya Fornminnissavni leyst at søkja. Starvið er tíðaravmarkað frá 1. desember 2005 til 30. november 2006.

**Høvuðsuppgávur**
Arbeiðið fevnir serliga um eftirlit við friðaðum bygningum, málsviðgerð, skráseting og byggisøguligar kanningar umframt eftirlit við og ráðgeving í sambandi við røkt og ístandseting av friðaðum og varðveitingarverdum bygningum.

**Førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum restaureringsarkitektur ella arkitektur, og neyðugt er við antikvariskum áhuga ella royndum.

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarar hava góðar málsligar førleikar og teldukunnleika.

Røttu viðkomandi eru persónar, sum eru sjálvstøðugir, arbeiðssamir, fyrikomandi og duga at samstarva.

**Vit kunna bjóða**
Spennandi starv við nógvum avbjóðingum, sum samstundis er fakliga krevjandi, og eitt gott arbeiðsumhvørvi.

**Setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskifti, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag.

Núverandi starvsstaður er í Hoyvík, men tann, ið settur verður, má vera til reiðar at ferðast kring landið í kanningar- og eftirlitsuppgávum stovnsins vegna.

Nærri frágreiðing um starvið fæst við at venda sær til Føroya Fornminnissavn, Andras Mortensen, stjóra, ella Mayfinn Norðoy, arkitekt, tlf. 310700 (ella 352716 / 352719).

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi

7. november 2005

**Føroya Fornminnissavn**
Kúrdalsvegur 2
Postboks 1155
110 Tórshavn

Toyota - dele
brugte og nye
Vi sender hver dag til Færøerne
AABENRAA AUTOGENBRUG
TEL (+45) 74 61 41 10
FAX (+45) 74 61 41 64
www.dkauto.dk · salg@dkauto.dk
Sosialurin 341800